# Mugu renna skjótari á Landssjúkrahúsinum í ár

*Landssjúkrahúsið verður meiri og meiri niðurpínt, tí longu nú er tað greitt, at í ár verður tað neyðugt at seta enn fleiri sparingar í verk fyri fyri at halda játtanina, enn tað var í fjør. Men yvirlæknarnir vóna, at tað slepst undan fleiri uppsagnum*

Áki Bertholdsen



*At taka heilar funktiónir av á Landssjúkrahúsinum, hevur nú verið nevnt í ovastu leiðsluni sum ein møguleiki at spara. Men so skulu fleiri sjúklingar sendast landinum, sigur Jón á Steig, yvirlækni Játtanin í ár hækkar ikki so nógv sum lønarhækkingin og samstundis hava ymsar deildir undirskot frá í fjør við sær til árið í ár.*

– Beint nú sær tað ikki so gott út. Men so fáa vit at síggja, hvussu alt tørnar út.

Jón á Steig, leiðandi yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, sigur, at eisini 2000 verður eitt sera trupult ár á Landssjúkrahúsinum.

Týsdagin var fundur ímillum leiðsluna á og yvirlæknarnar á Landssjúkrahúsinum um játtanina, sum tey hava fingið á fíggjarlógini í ár.

Á fundinum vóru bara høvuðstølini umrødd.

Men hóast tey ikki fóru í smálutirnar, kann Jón á Steig longu nú staðfesta, at tað verður neyðugt við enn fleiri tiltøkum í ár fyri at halda játtanina, enn í fjør.

– Vit hildu, at kreppan var av nú. Men tað vísir seg ikki, í hvussu so er ikki á Landssjúkrahúsinum. Tí eftir fundin mugu vit staðfesta, at vit aftur einaferð enn noyðast undir eitt ár, har vit skulu renna skjótari, enn vit gjørdu í fjør, sigur hann.

Nú skal so játtanin býtast sundur ímillum tær ymsu deildirnar og undirdeildirnar á Landsjúkrahúsinum og fyrrenn tá, ber ikki til at siga nágreiniliga, hvussu støðan verður.

## Pengar fylgja ikki við

Yvirlæknin sigur í kreppuárunum varð farið yvir til eitt slag av stýring á Landssjúkrahúsinum, sum nevnist „rammustýring“.

Tað merkir, at Landssjúkrahúsið fær ein posa av pengum, sum tað so skal klára seg fyri.

Peningurin verður so býttur sundur ímillum tær ymsu deildirnar og undirdeildirnar.

– Men „rammustýring“ merkir eisini, at hevur eitt nú ein seingjadeild undirskot eitt ár, tekur hon undirskotið við sær yvir í tað nýggja árið.

Frammanundan varð játtanin til Landssjúkrahúsið ásett eftir tí virksemi sum var.

– „Rammustýring“ er eitt amboð, sum verður brúkt í krepputíðum. Men nú mugu vit koma burturúr hesi støðu aftur, so at játtanirnar fara at fylgja við tí virkseminum, sum er sigur Jón á Steig.

Hann sigur, at í fjør fekk Landssjúkrahúsið um 220 milliónir til raksturin.

– Í ár er játtanin 232 milliónir. Men tær 12 milliónirnar, sum eru komnar afturat, eru ikki nóg mikið til lønarhækkingina, sum starvsfólkið fekk í fjør og aftur fær seinni í ár.

Yvirlæknin sigur, at bara fyri at leggja upp fyri lønarhækkingunum, skuldi játtanin verið næstan tvær milliónir hægri í ár, enn hon er.

– Men harafturat eru tað ymsar deildir, sum hava undirskot við sær inn í 2000.

– So bara hetta ger, at tað verður neyðugt at húsast betri við játtanini í ár, enn í fjør, sum hann tekur til.

Hann sigur, at enn er onki avgjørt, hvar møguligar sparingar, skulu setast í verk.

– Men tað er ongin loyna, at eini 80% av útreiðslunum eru lønir. So skal tað sparast, eru tað lønirnar, sum fyrst verður hugsað um.

Hann leggur tó dent á, at enn er ongin avgerð tikin og hann vónar heldur ikki, at tað verður neyðugt at siga fólki upp.

## Niðurleggja funktiónir

Jón á Steig sigur, at Landssjúkrahúsið hevur nú spart so nógv hesi seinastu árini, síðani kreppan rakti, at tað er ein spurningur, hvussu leingi hetta gongur.

Og tað er ikki bara á Suðuroyar Sjúkrahúsi, at tosað verður um at leggja heilar funktiónir niður. Tað hevur eisini verið umrøtt á okkara høvuðssjúkrahúsi.

Og hetta var eisini nevnt á fundinum ímillum sjúkrahúsleiðsluna og yvirlæknarnar á Landssjúkrahúsinum týsdagin. Tí, nú er støðan komin hartil, at tað nyttar ikki stórt meiri at finna sparingar við at siga einstøkum fólkum upp her og har.

– Vit eru nú komin hartil, at vit eisini eru farin at hugsa tann tanka, at einasta loysnin er at taka heilar funktiónir av.

– Og tann bólturin varð eisini kastaður upp í loft á fundinum ímillum yvirlæknar og leiðslu týsdagin.

Jón á Steig sigur, at fyri 10 arum síðani varð játtanin til raksturin á Landssjúkrahúsinum 252 milliónir, ella 20 milliónir hægri enn nú.

– Sostatt hava vit nú 20 milliónir minni til raksturin, enn vit høvdu fyri 10 árum síðani, og tað merkist sanniliga tað merkist.

– Tí samstundis eru lønirnar farnar upp. Og ikki minst virksemið munandi økt hesa tíðina við tað, at bæði sjúklingatalið er nógv hægri, umframt at Landssjúkrahúsið hevur fingið nógv fleiri funktiónir at røkja.

– Og nú vit eru ikki so langt frá, at vit mugu fara at tosa um at taka heilar funktiónir av.

Men avleiðingin av tí verður, so, at fleiri sjúklingar verða sendir til Danmarkar.

– Kostnaðurin fyri at senda sjúklingar til Danmarkar er ein játtan heilt fyri seg. Men flyta vit funktiónirnar til Danmarkar, flyta vit samstundis arbeiðsplássini til Danmarkar, tí sjúklingarnir skulu hava viðgerð, so ella so.

Jón á Steig sigur, at tað verður Almanna- og heilsumálastýrið, sum má avgera, hvørjar funktiónir, skulu takast av, tvs, um vit ongan eygnalækna ella oyrnalækna skulu hava longur, um tað skulu vera dialysusjúklingarnir, krabbameinssjúklingarnir, ella aðrir sjúklingar, sum hereftir skulu sendast av landinum, sigur Jón á Steig.

Hann leggur tó dent á, at enn eru ongar sum helst avgerðir tiknar í so máta.

Men hann vísir á, at nú er starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum av álvara farið at troyttast av at fáa alsamt fleiri og fleiri byrðar omanyvir seg.

Og hann viðgongur eisini, at tað var eitt vónbrot at byrja eina nýggja øld og eitt nýtt túsundáraskeið í sama stíli, sum tað gamla varð slept uppá.

# Fekk skeivar upplýsingar frá landsstýrinum

*Tað kostaði einum føroyskum skipara bót at hann trúði upplýsingunum, sum hann fekk frá Føroya Landsstýri.*

Áki Bertholdsen

Kann tað veruliga bera til, at ein føroyskur fiskiskipari skal kunna revsast, tí landsstýrið gevur honum skeivar upplýsingar?

Hetta er ein spurningur, sum Skipara- og Navigatørfelagnum vil hava greiði á.

## Fekk bót

Og nú er møguleikin at fáa tann spurningin svaraðan.

Tí nú hevur Skipara- og navigatørfelagið stevnt landsstýrið fyri at hava givið einum føroyskum skipara skeivar upplýsingar.

Talan er um eitt gamalt mál. Tað var longu í 1992, at eitt føroyskt trolarapar varð tikið í norskum sjógvi fyri at hava brúkt skeiva framferð, tá ið fiskiskapurin varð givin upp fyri norsku myndugleikum.

Eftir drúgva viðgerð í Noregi endaði tað við, at annar skiparin fekk 10.000 krónur og bót og reiðarin 100.000 krónur.

– Hetta er eitt mál, sum vit taka í allarstørsta álvara, tí tað vísti seg, at hesin skiparin gjørdi ikki annað enn at fylgja teimum forskriftum, hann hevði fingið frá landsstýrinum, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara og Navigatørfelagnum.

Hann sigur, at felagið tí stevndi við kravi um, at landsstýrið viðurkendi, at tað hevði givið skiparanum skeivar upplýsingar og at tað tí var landsstýrið, sum átti at gjalda bótina.

–Landsstýrið hevur fleiri ferðir fingið málið útsett.

– Men beint fyri jól fall dómurin: Og tað vísti seg, at landsstýrið fekk viðhald, tí rætturin sigur, at skiparin hevur ábyrgdina av, at hann hevur tær røttur reglarnar.

Ellintur Abrahamsen sigur, at hetta er eitt mál, sum Skipara og navigatørfelagið leggur sera stóran dent á. Tí er tað alt, sum talar fyri, at málið eisini verður lagt fyri landsrættin.

Formaðurin sigur, at málið er rættiliga lætt at misskilja.

– Tað er ongin ivi um, at skiparin hevur ábyrgdina av útvega sær tær røttu reglugerðirnar.

– Men kjarnin í málinum er, at skiparin júst vendi sær til røttu myndugleikarnar, sum eru Føroya Landsstýrið, fyri at fáa teir røttu upplýsingarnar.

– Men hann fekk skeivar upplýsingar frá landsstýrinum, og tað var hetta, sum feldi hann í Noregi.

Skiparin fekk eitt fiskiloyvi frá landsstýrinum. Við fiskiloyvinum fylgir ein fráboðanarskylda, sum hann skal brúka. Men loyvið, hann fekk frá landsstýrinum, samsvarar ikki við norskar reglar og tí fekk hann bót. Og tað er hetta, vit hefta okkum við, sigur formaðurin í Skipara og Navigatørfelagnum.

Hann sigur, at tað er eitt so mikið avgerandi mál, at skiparar ikki kunnu ábyrgdast fyri á upplýsingarnar, teir fáa frá teimum røttu myndugleikunum, sum er landsstýrið, at tað er alt, sum talar fyri, at málið verður roynt í landsrættinum. Hevði skiparin fingið at vita frá landsstýrinum, at hann skuldi útvega útvega sær neyðuga tilfarið sjálvir, so gjørdi hann tað. Men hesuferð varð hann villleiddur av landsstýrinum og tað er ein álvarsligur trupulleiki, sigur Ellintur Abrahamsen.



# Íløgukarmurin 2,6 mió. fyri ár 2000

*Skattaprosentið í Sørvági verður óbroytt 21, kirkjuskattaprosentið 0,25 og barnafrádrátturin verður 2500 kr. Eisini varð samtykt at gjalda tvær milliónir í eykaavdráttum, sigur Petur Kruse, bygdaráðsformaður, í árligu ársfrágreiðing síni*



*Petur Kruise er bygdarráðsformaður í Sørvágs kommunu*

ÓLAVUR Í BEITI

Hetta er triðja árið hjá sitandi bygdaráð í Sørvági, og aftur hevur bygdarráðsformaðurin, Petur Kruse, skriva greiða og kunnandi frágreiðing um farna árið. Á bygdaráðsfundi fyrst í desember 99 var fíggjarætlanin hjá Sørvágs kommunu til 3. viðgerð og endaliga samtykt, og er nú eisini góðkend av Føroya Landsstýri. Skattaprosentið verður óbroytt 21, kirkjuskattaprosentið 0,25 og barnafrádrátturin verður 2500 kr. Eisini varð samtykt at gjalda tvær milliónir í eykaavdráttum, skrivar Petur Kruse, bygdaráðsformaður. Viðvíkjandi fíggjarætlanini fyri ár 2000 hjá felagskommununi í Vágum, sigur Petur Kruse, at hon er kr. 205.000. Henda upphædd verður býtt soleiðis, at helvtin verður deild í mun til skattskyldugu inntøkuna fyri árið 1998, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.99. Samlaða býtið fyri ár 2000 verður: Sandavágs kommuna kr. 52.480,00 – Miðvágs kommuna kr. 72.272,75 – Sørvágs kommuna kr. 74.138,25 – Bíggjar kommuna kr. 5.073,75 – Mykines kommuna kr. 1.035,25.

## Avlop uppá 4.2 mió.

Og hyggja vit eftir árinum 98, so sær gott út hjá Sørvágs kommunu. Grannskoðaði roknskapurin fyri 1998 var framlagdur og góðkendur á bygdarráðsfundi 14.12.99. Ársroknskapurin vísir ein rakstur sum javnvigar við kr. 21.195.046 og eini fíggjarstøðu, sum javnvigar við kr. 30.730.839. Í figgjarætlanini fyri 1998 var roknað við einum avlopi áðrenn avdráttir uppá kr. 3.659.000. Roknskapurin vísir eitt avlop uppá kr. 4.247.000.

Og viðvíkjandi Ísvirkinum, sum kommunan hevur verið høvuðspartaeigari í, sigur bygdaráðsformaðurin, at tað hevur ikki gingið væl fíggjarliga, og nevndin kom tí í árinum til ta niðurstøðu, at bert tvinnir kostir vórðu í at velja: antin at virkið fór á húsagang, ella at nýggjur partapeningur var útvegaður. Bygdaráðið samtykti at taka undir við, at nýggjur partapeningur var fingin til vega, samstundis samtykti bygdaráðið at strika eitt lán til virkið uppá kr. 484.116 og yvirtaka leysaskuldina hjá virkinum uppá kr. 86.000. Nýggju eigararnir í sp/f Vestís eru Vesturvarði – Vesturskin – Vesturvón og arbeiðsmannafelagið í Sørvági.

– Kommunan hevur roynt at bøta um umstøðurnar hjá útróðrarmonnunum við at seta ein krana á havnalagið til uppskipan, oljusjálvtøkutangi er settur upp í bátahylinum, og kommunan hevur gjørt leigusáttmála við Sørvágs Laks um gomlu stampagoymsluna, sum er sett í stand og uppdeild í básar, sum útróðrarmenninir so leiga.

## Fólkatalið 888

Viðvíkjandi fólkatalinum, so sigur Petur Kruse, at tað seinnu árini hevur kvinkað seg uppeftir.Í seinastuni hevur tað ligið um 890 fólk, men við ársenda í fjør vóru 898 fólk, meðan tað tann 28.12.99 er 888 íbúgvar.

– Langt hevur verið ímillum nýggj hús í bygdini, men nú er ein glotti fyri stavn. Eini hús eru í gerð, og eitt til tvey verða sett skjøtil á í tí nýggja árinum. Av og á spyrja borgarar eftir grundstykkjum, men tá kommunan ikki hevur so nógv stykkir tøk, so heitir bygdarráðsformaðurin á fólk um at boða frá, um tey hava eitt stykki til sølu.

## Íløgur

Av íløgukarminum uppá 2,6 mió. kr. fyri ár 2000 fer meginparturin til vegaarbeiði, og sum høvuðsarbeiði verður hildið áfram við vegnum norður í Húsadal, har tað drúgvasta pettið er klárt til sproytingar, men sum so kavin forðaði at fáa gjørt, sigur Petur Kruse.

– Av øðrum arbeiðum kann nevnast, at í samarbeiði við SEV verður hildið áfram við at leggja loftlinjurnar í jørð, og í tí sambandi verða nýggir elsteyrar uppsettir, so í komandi ári skuldu flestu loftlinjur í bygdini verið tiknar niður. Eisini liðugtgerð av vatn- og kloakkíbindingum út eftir ovara vegi stendur fyri tørni í komandi ári.

Og aftur í ár hevur Sørvágs kommuna fingið góðar 200.000 kr. til ung í arbeiði, og hava hesi ungu verið í holtur við at fríðka um í bygdini, og nú síðstu dagarnar hava tey veitt SÍ eina hjálpandi hond við liðugtgerð av SÍ-húsinum. Seks unbgfólk – 5 mannfólk og 1 konufólk - saman við einum formanni, hava verið í tiltakinum »ung í arbeiði«.



*Av íløgukarminum uppá 2,6 mió. kr. fyri ár 2000 fer meginparturin til vegaarbeiði, og sum høvuðsarbeiði verður hildið áfram við vegnum norður í Húsadal, har tað drúgvasta pettið er klárt til sproytingar, men sum so kavin forðaði at fáa gjørt, sigur Petur Kruse*